Framhald frá síðu 10

ina at tváa sær hendurnar við, — lógin er jú fyri øll. Millum annað tekur húskallurin soleiðis til: »Hvat vilt tú við okkum, Gud? Við aðrari hondini velti eg fyri bóndan, meðan hin sáar illgresi mítt. Verjan, hvør er mín verja? Tit kalla meg óeydnismann. Óeydnis eri eg, tí tit hava ikki bundið meg heilt niður. Eg girnaðist frælsi, forbannaði trælurin eg. Helt meg vera meira enn ein hund, og fjóskonuna annað enn eina tík. Er hetta tín dómur, harri? Hví skapti tú fæloysingunum kenslur og skapti okkum í tínum bílæti«. Við øgiligari styrki og knívskørpum orðum er parturin um tey bæði, gevur eitt spæl, ið fær ylin at ganga kykan gjøgnum kroppin. Men hvat hendir so, jú, sum við seyðatjóvinum. Aftur eitt tilfelli bjargar teimum. Av óvart verður húskallurin vitni til ein loynihandil, bóndin hevur við fremmand handilsskip. Tá straffurin fyri tílíkan handil er strangur, býður bóndin húskallinum ein teig at seta sær egin hús á. Og so verður. Húskallurin, sum áður hevði verið heitur uppreistrarmaður, ið hevði sæð, hvussu samfelagið armar tann, ið ikki er føddur til arv, verður av hasum áðurnevnda tilfellinum ein spakur smámaður. Fullkomiliga gloymir hann, at túsundir aðrir húskallar ikki uppliva hansara tilfelli, at teir aldri gerast smámenn. Men lívið livst víðari.

Kópakonan føðir eina dóttir, sjálvandi til sorg fyri bóndan, ið vil lata seg sjálvan liva víðari gjøgnum ein son. Kuldin, ið umgirðir alt, er við at taka hana av fótum, og so ræðuligu kristnu sermoniurnar, kvinna, ið hevði átt, skuldi ígjøgnum. At hon er skitin, órein, fatar kópakonan ikki, líka lítið, sum vit fata tað í dag. Fyri hana er tað heilagt at seta barn í heimin, ískoytið frá kirkjuni gjørdi tað heilaga skitið. Í 3. Mósebók kap. 12 stendur millum annað: »Men føðir hon moybarn, tá skal hon verða órein í fjúrtan dagar, eins og tá hon er órein av mánasjúku síni; og síðan skal hon sita heima í seksti og seks dagar, meðan hon hevur blóðreinsan sína.« Í teimum ræðuligu 66 døgunum, hon gongur knúskað av kirkjuni, verður sum so ofta í leikinum sett spurnartekin við teir ymisku almennu sannleikarnar, siðirnir verða grópaðir ígjøgnum.

Hæddarpunktið er, tá húshjálpin, ið »ansar« kópakonuni, sigur: »tú og tínir líkar skapa ólag í, so allur okkara heimur fer at rilla.« Hasi orðini innihalda stóran sannleika, nevniliga, at tey, ið eru eitt sindur øðrvísi, tey ið tora at hugsa útum markini, ognarrætturin og kirkjan hevur sett, tey skapa ólag í, tí fólk verða tá tvungin at hugsa, at taka sína egnu støðu og umstøðurnar í síni heild upp til umhugsunar.

Ein dagin bóndin er til útróðrar, hevur hann gloymt lykilin til kistuna, og í kistuni liggur gamli hamurin hjá kópakonuni. Hon brúkar møguleikan, vendir menniskjasamfelagnum bakið og fer í havið aftur til sítt gamla lív. Í dreymi kemur hon til bóndan, og áleggur honum, tá farið verður til látur aftur, ikki at drepa sin brimil og teirra hvølpar. Men í hevndini sorar hann alt, og tá kemur kópakonan til bygdina aftur, men hesaferð í skapi sum øgiligt trøll, og lesur forbannilsi yvir tey. Tekur millum annað soleiðis til:

So mikið skal falla
og so mikið skal doy
at tey kunna í fevning taka
alla hesa oy.

Hatta forbannilsið kundi ein tulka sum at mannaættin hevur ongan møguleika, at hon vil kvalast í sínum egna skarni, og tó.

Kanska er tað ein kraftig áminning, at verður onki gjørt við okkara sjúku jørð skjótt, fer alt til havs sum kópakonan.

Hatta var í stórum hæddarpunktini í leikinum, men partar eru inn í millum, sum eftir mínum tykki skuldu verið strikaðir. Tað eru smáleikirnir hjá Steinbjørn Jacobsen, sum eg haldi vera frálíka satiru, men óneyðugt at taka við í leikin. Leikurin er ivaleysa sterkur í sær sjálvum.

Grima, sum er samansett av fimm fólkum, hevur í »Kvæðinum um kópakonuna« 13 ymiskar leiklutir, sum tey býta sundur sínamillum. Skiftið millum tey ymisku leikpettini gongur skjótt og presist. Bert tann eina leiklutin skilji eg ikki rættiliga, tað er ispegilin. Haldi, hann virkar avleiðandi frá leikinum, fær spælið at floyma út.

Við hesum ummælinum haldi eg meg eisini hava lýst, at hvat innihaldi viðvíkir, brýtur Grima harðliga av frá tí »gamla« teatrinum. Bara at seta teir spurningar, Grima gjørdi, hóast niðurstøðurnar í nøkrum førum kundu verið betri, bara at gera tað, vísir eitt álvarsligt brot. Tí eyðkennið fyri »gamla« teatrið er heilt einfalt at spæla fittar, hugnaligar og meinaleysar leikir, at grýta bomm og ljósareyðar ballónir fyri fólkið, at lulla okkum í blund við bagatellum. Og teirra leiktjøld eru fullkomin, klædnadraktirnar ikki aftanfyri, alt skorið út í papp, onki yvirlatið til áskoðarans hugflog.

Hvat formi viðvíkir, leggur Grima stóran dent á kroppin sum grundarlag fyri øllum leiki, at lata hann úttrykkja kenslurnar. Og øll vita vit, hvussu avmarkað, tað at tosa, er, at orðini ikki røkka longur enn til eitt vist mark. Eisini brúkar Grima teir stóru møguleikarnar, sum liggja í ljósinum, á palli. Havi ikki sæð betri ljósnýtslu.

Men einaferð enn. Sjálvandi finst nógv annað tilfar í leikinum, men tað er ikki meiningin við einum ummæli, at hvør detalja skal umrøðast. Heldur skal ummælið roknast sum vegleiðing fyri bólkin, og sum stuðul til hin minni krittiska áskoðaran.

Tillukku Grima, vóni bert, tit fáa meiri pening at arbeiða við, tí sanniliga hava tit vist, at tykkara arbeiði er tað vert.


Jóanes Nielsen


Føroyskt tógv
Føroysk pløgg
Ull

Skipstroyggjutógv, grátt	50 kr. kg
ditto, hvítt	60 kr. kg
ditto, myrkamorreytt og ljósamorreytt	70 kr. kg
Heimatroyggjutógv, hvítt og grátt	70 kr. kg
ditto, myrkamorreytt og ljósamorreytt	80 kr. kg
Nappað tógv, allir litir	130 kr. kg
Undirtroyggjur úr nappaðari ull	110 kr. stk.
Undirbuksur úr nappaðari ull	110 kr. parið
Faroe Sock	23 kr. parið
Elin hosur	23 kr. parið
Stivlahosur upp móti knæ	30 kr. parið
Vøttir	20 kr. parið

Vit keypa óvaskaða ull fyri 7 kr. pr. kg. Vaskaða: Hvíta 14 kr., gráa 10 kr. ljósamorreyða og myrkamorreyða 16 kr. pr. kg.

TØTINGARVIRKIÐ
v. Ólavur Gregersen, GØTA, tlf. 41020-41120





Reolir í furu — nøt og brúnbeisa stereomøblar — entrémøblar brúnbeisa og nógv annað

Møblabúðin »SVALIN«
Tlf. 12388 — 3800 Tórshavn